# Dynamo Kiev hevur fingið ferð á

*Hálvfinalistarnir frá undanfarnu kapping, Dynamo Kiev, hava nú vunnið tveir dystir á rað, og eru nú ájavnir Real Madrid á øðrum plássi í bólki C. Í bólki D er alt framvegis púrasta opið*



*Unga spanska stjørnan, Raul, takkar farandi týsku stjørnuni, Matthaus fyri dystin mikukvøldið*

Jákup Mørk

**Bólkur C**
**Farvæl til Matthaus**
Oddaliðið í Bólki C, Bayern München, styrkti um støðu sína, tá teir á heimavølli vunni 4-1 á Real Madrid.

Dysturin var bert fýra minuttir gamal, tá Mehmet Scholl legði týska liðið fram um, og á hálva tímanum økti brasiliumaðurin, Elber, upp í 2-0.

Real Madrid kom tó nakað fyri seg aftur, og tá hálvur tími var eftir at leika, minkaði Helguera um munin. Týsku meistararnir góvust tó ikki á nakran hátt, og tvey mál frá Alexander Zickler syrgdu fyri endaligu støðuni.

Hetta var annars eitt sera kensluborið kvøld fyri týska veteranin, Lothar Matthaus, við tað at hetta var seinasti dystur hansara í reyða Bayern búnanum. Í dag gongur leiðin til USA, har hann ætlar at enda yrkisleið sína hjá New York Metrostars.

Sostatt eru týsku meistararnir mest um vísir í at koma til fjórðingsfinalurin, meðan Rela Madrid hinvegin nú er undir hørðum trýsti frá Dynamo Kiev.

Ukrainsku meistararnir leiktu mikukvøldið á útivølli móti norska Rosenborg, og við tveimum málum frá Sergei Rebrov, eydnaðist tað at teimum at fáa ein tepran sigur heim aftur við sær.

Rebrov, sum nú verður settur í samband við Tottenham, skoraði til 1-0 eftir góðan hálvan tíma, men løtu seinni javnaði Orjan Berg fyri norsku meistararnar.

Eftir hetta gekk javnt á, men Rebrov sløkti enn einaferð norsku vónirnar, tá hann um miðjan seinna hálvleik skeyt seinasta málið í dystinum.

Á odda í bólki C er framvegis Beyern München við tíggju stigum. Dynamo Kiev og Real Madrid hava nú bæði seks stig, meðan Rosenborg á fjórða plássinum hevur eitt stig.

**Bólkur D**
**Støðan er sera spent**
Í bólki D eydnaðist tað Chelsea at vinna seg upp á ovastu rók, eftir at teir á heimavølli vunnu 1-0 á Olympique Marseille.

Málið fingu teir um miðjan fyrra hálvleik, tá liðskiparin, Dennis Wise, sendi eitt hart skot í netið.

Spælið hjá enska liðnum var tó einki at reypa av, og venjari teirra, Gianluca Vialli, segði eisini eftir dystin, at teir mugu finna annað spæl fram, um framhaldandi luttøka í kappingini skal tryggjast. Týdningarmiklu stigini komu tó til høldar, og hetta fegnaðist italiumaðurin eisini um.

Í hinum dystinum í bólkinum, eydnaðist tað hollendska Feyenoord at fáa ein málleysan javnleik á heimavølli móti Lazio, hóast tað meginpartin av dystinum vóru rómverjarnir, sum høvdu mesta spælið.

Ofta gekk tað tó ov seint fyri seg, og tískil megnaði Feyenoord at halda mótstøðuliðnum frá teimum stóru møguleikunum.

Tó var tað um reppið, at Lazio fór avstað aftur við øllum stigunum, tá Feyenoord málverjin, Dudek, kiksaði eitt útspæl, soleiðis at Marcelo Salas slapp at halda beina kós móti málinum. Málverjin megnaði tó at bøta um skaðan, og harvið tryggja heimaliðnum annað stigið.

Feyenoord og Chelsea eru nú á odda í bólki D við sjey stigum í part, meðan Lazio á triðja plássinum hevur fimm stig. Aftast er Marseille við trimum stigum, so enn er einki avgjørt í bólkinum.

# Vinn pláss hjá Herfølge

*Komandi fýra vikurnar ber til at vinna sær pláss á oddaliðnum í donsku superliguni*

Jákup Mørk

Danska Tipstænastan hevur nú gjørt av, at komandi fýra vikurnar verður lutakast millum tey, sum tippa í sonevnda Tips 12.

Tips 12 fevnir um dystirnar í donsku kappingini, og fyri at gera vart við spælið, nú danska kappingin byrjar aftur um vikuskiftið, hevur Tipstænastan tikið hetta stigið.

**Viku sáttmálar**
Millum allar røðirnar, sum vinna nakað sum helst komandi vikurnar, verður lutur kastaður um 10 eykavinningar, sum eru ein vikulangur sáttmáli við oddaliðið í Superliguni.

Venjarin, Joh Faxe Jensen, hevur lovað at taka væl móti nýggju leikarunum, og sleppa teir sostatt at venja og ferðast saman við liðnum.

Faxe vil tó ikki siga nakað um, hvørt nýggju leikararnir fáa møguleika at royna seg í dysti.

Vinnararnir av lutakastinum hava eisini møguleika fyri at býta sáttmálan um við 25.000 kr.

# Føroyskir jugoslavar í Týsklandi

*Teir báðir jugoslavarnir, Ninoslav Milenkovic og Velibor Kopunovic royna seg nú í týskum fótbólti*

Jákup Mørk

Seinastu árini hevur talið av útlendingum í føroyskum fótbólti verið alsamt hækkandi.

Nakrir av hesum útlendingum støðast rættuliga væl, meðan aðrir bert eru her eitt ár ella so, fyri síðani at royna aðrar leiðir.

Tveir av hesum seinnu nevndu eru teir báðir, Velibor Kopunovic og Ninoslav Milenkovic, sum báðir hava roynt seg í føroyskum fótbólti.

Velibor kom henda vegin saman við táverandi VB venjaranum, Tomislav Sivic, tá hesin kom til landið í 1996. Ninoslav hevur roynt seg í føroysku kappingini seinastu tvey árini, har hann hevur verið fastur fúsur á B36 liðnum, eisini við Tomislav Sivic sum venjara.

Eftir at teir eru farnir úr Føroyum, hevur lítið verið at hoyrt til teir, men nú hevur ein vakin lesari funnið nøvn teirra á heimasíðuni hjá týska liðnum Dynamo Dresden.

Dynamo Dresden liggur í løtuni á 12. plássi í regionalliguni fyri landnyrðingspartin av Týsklandi.

# Grand-Prix í badminton

*Um vikuskiftið var seinasta umfar í kappingini hjá yngru leikarunum leikt. Vaksnu leikararnir hava enn tvey umfør eftir at leika*

Jákup Mørk

Legardagin leiktu yngru leikararnir seinasta umfari í Grand-Prix kappingini. Kappast varð í einmansleiki, og fór kappingin fram í badmintonhøllini í Havn.

Hetta var sætta kappingin, sum hildin varð í vetur, og í hvørjari kapping, hava einstøku leikararnir fingið stig, alt eftir hvussu tey hava staðið seg.

Nú seinasta kappingin varð leikt, kundu stigini teljast saman, soleiðis at endaligu vinnararnir av Grand-Prix kappingini kundu kjósast, og vórðu hesi sum víst niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Gentur 10 ár: | |
| Nr. 1 Brynhild Carlsson, HBF | 1500 stig |
| Nr. 2 Agnas Olsen, VÍF | 1330 stig |
| Nr. 3 Conni Kass Jacobsen, HBF | 1185 stig |
| Dreingir 10 ár: | |
| Nr. 1 John André Niclasen, ÍF | 1500 stig |
| Nr. 2 Magnus á Rógvu, VÍF | 1310 stig |
| Nr. 3 Jan Ellingsgaard, ÍF | 1185 stig |
| Gentur 10-12 ár: | |
| Nr. 1 Rannvá á Rógvu, VÍF | 1400 stig |
| Nr. 2 Ulla í Dávastovu, VÍF | 1380 stig |
| Nr. 3 Christina Eriksen, VÍF | 1295 stig |
| Dreingir 10-12 ár: | |
| Nr. 1 Niclas Eysturoy, HBF | 1500 stig |
| Nr. 2 Hilmar Kass Jacobsen, HBF | 1355 stig |
| Nr. 3 Bjarki Kristian Gram, HBF | 1215 stig |
| Gentur 12-14 ár: | |
| Nr. 1 Lis Christoffersen Hansen, VÍF | 1012 stig |
| Nr. 2 Margith Durhuus, VÍF | 470 stig |
| Nr. 3 Elisabeth Petersen, VÍF | 444 stig |
| Dreingir 12-14 ár: | |
| Nr. 1 Thomas Rubeksen, HBF | 1475 stig |
| Nr. 2 Gunnar Poulsen, HBF | 1297 stig |
| Nr. 3 Jákup á Lakjuni, ÍF | 1280 stig |
| Dreingir 14-16 ár: | |
| Nr. 1 Høgni Madsen, ÍF | 1325 stig |
| Nr. 2 Dánial Pauli Joensen, ÍF | 1235 stig |
| Nr. 3 Steinar Jacobsen, ÍF | 1190 stig |
| Kvinnuunglingar: | |
| Nr. 1 Elin Hansen, HBF | 800 stig |
| Nr. 2 Fríða Næs, VÍF | 445 stig |
| Nr. 3 Guðrun Poulsen, VÍF | 444 stig |
| Mansunglingar: | |
| Nr. 1 Bjartur Lamhauge, HBF | 1150 stig |
| Nr. 2 Aksel Poulsen, HBF | 1140 stig |
| Nr. 3 Marius Thomassen, HBF | 735 stig |

Okkum hevur tíverri ikki eydnast at fáa myndir av øllum vinnarunum, men flestu av myndunum hava vit fingið, og eru hesar vístar á næstu síðu.

Vaksnu leikararnir royndu seg eisini um vikuskiftið.

Grand-Prix kapping teirra er tó ikki liðug enn, tí enn resta tvey umfør í, áðrenn endaligu vinnararnir kunnu kjósast. Vinnararnir sunnudagin vóru hesi:

Kvinnur:
Nr. 1 Ingun Hansen, Strálan
Nr. 2 Elin Jacobsen, HBF

Menn:
Nr. 1 Ragnar Rasmussen, HBF
Nr. 2 Erland Poulsen, HBF

Hóast Grand Prix kappingin hjá yngru leikarunum nú er liðug, so er kappingarár teirra kortini ikki av enn.

Næsta kappingin verður FM í badminton, har kappast verður í bæði einmans- og tvímansleiki.



# Vinnarar av Grand-Prix 2000

*Sum greitt frá á undanfarnu síðu, so hevur tað tíverri ikki eydnast okkum at fáa myndirnar av øllum vinnarunum.*

*Hjálagt eru tó myndir av tirmum teimum fremstu leikarunum í nøkrum av deildunum*

*Sosialurin ynskir øllum vinnarunum hjartaliga tillukku við sigrinum*



*Gentur 10 ár, Agnas, Brynhild og Conny*



*Dreingir 10 ár, Magnus, John André og Jan*



*Gentur 10-12 ár, Ulla, Rannvá og Christina*



*Dreingir 10-12 ár, Hilmar, Niclas og Bjarki Kristian*



*Dreingir 12-14 ár, Gunnar, Thomas og Jákup*



*Dreingir 14-16 ár, Dánial Pauli, Høgni og Steinar*



*Mansunglingar, Aksel, Bjartur og Marius*